Nr. 55 - 17. mars 2006

# Kalt í djóragarðinum

**Keypmannahavn:** Flestu okkara hava bestan hugin at halda okkum innandura í kalda vetrarveðrinum. Seinastu dagarnar hevur verið kalt, og onkra náttina hava hitamátararnir rokkið heili 16 kuldastigum. Kortini eru summi, sum njóta kuldan. Millum annað í djóragarðinum í Keypmannahavn síggjast hesar dagar djór, sum stuttleika sær í kavanum og stórtrívast í kuldanum. Sosialurin var ein túr í Zoologisk Have við myndatólinum. Um tú veitst onkran føroying, sum arbeiðir í garðinum, ger so væl at siga okkum frá.



*Úlvar eru hundar, og sum allir hundar, so elska teir kava og trívast sera væl í kuldanum. Úlvurin er millum annað kendur fyri at vera eitt sera vandamikið djór og skal hava dripið nógv menniskju. Men satt at siga, so finst ikki ein vældokumenterað hending, har ein úlvur hevur dripið eitt menniskja. Úlvurin er ættarfaðir hjá øllum hundum, sum vit kenna í dag. Hann livir í flokkum og teir eru sera góðir við hvønn annan. Eitt sindur stuttligt er tað, at í djóragarðinum í Keypmannahavn uppliva tey ofta, at tá ein sjúkrabilur fer ýlandi framvið garðinum, so byrja allir úlvarnir eisini at ýla. Úlvur hevur ikki verið í Danmark síðani í 1700-talinum.*



*Oyðimarkarinnar skip: Kamelurin er lagaður lívinum í asiatisku oyðimørkunum við glóðheitum sumrum og ísakøldum vetrum, og í fleiri túsund ár hava menniskju nýtt kamelin sum ferðasamband í oyðimørkini. Ein kamelur vigar 450-650 kg og livir 25-30 ár.*



***Sibiriski tikarin er største og tyngsta kettan sum finst. Ein fullvaksin hanntikari vigar upp ímóti 300 kg og er 2 metrar til longdar. Fyri minni enn hundrað árum síðan vóru 100.000 tikarar, í dag eru umleið 5.000 eftir***



***Ísbjørnin er heimsins største landlivandi rovdjór. Hon er tillagað eitt lív í kaldastu arktisku økjunum. Pelsurin er sniðgivin til at halda ísbjønini heita og er sum ein bjálvandi kappi. Hann er somuleiðis vatnavvísandi og stóru labbarnir virka sum kavaskógvar og svimjiføtur og eru bjálvaðir við einum tjúkkum hárlagi.***